**Nr. 6/2020**

**Aksel V. Johannesen**
**løgtingsmaður**

**Fyrispurningur eftir tingskipanini §52 a**

**Fyrispurningur um at flyta fyrisitingina hjá Vága- og Norðoyatunlinum settur landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Jørgeni Niclasen (at svara skrivliga eftir TS §52a).**

1. Hvussu gongur við ætlanunum at flyta fyrisitingina hjá Vága- og Norðoyatunlinum úr Havn til Runavíkarøkið?
2. Nær væntar landsstýrismaðurin, at feløgini hava flutt fyrisitingina inn til Runavíkarøkið?

**Viðmerkingar**

Táverandi landsstýrismaður í samferðslumálum, Henrik Old, avráddi við leiðsluna í tunnilsfelagnum, at fyrisitingin hjá Vága- og Norðoyatunlinum skuldi flyta úr Tórshavn inn í Runavíkarøkið frá 1. januar 2019. Hesum boðaði spyrjarin frá í ólavsøkurøðu síni í 2018.

Tíverri kunnu vit staðfesta, at flytingin hevur drigið út. Seinast spyrjarin visti, og tað var undan løgtingsvalinum 2019, varð leiguavtalu gjørd um hølir í Runavíkarøkinum. Men ávísar umvælingar skuldu gerast áðrenn flytast kundi inn. Tá einki hevur verið at frætt um málið í meira enn eitt ár, er áhugavert at fáa at vita, um gongd er í málinum, og nær væntast kann, at fyrisitingin verður flutt. Tí verður hesin fyrispurningur settur.

**Á løgtingi 12. august 2020**

Aksel V. Johannesen